

## Vágsbotnur í góðveðri

Jútsku politistarnir tóku sær av løttum á Vágsbotni nakrar tímar undan dystinum á Tórsvølli í gjár. Her í práti við havnarfólk í Vágsbotni. Jóhannes Jensen, stjóri á Hvonn og á Kafé Vágsbotn sigur, at kvøldið hepnaðist væl hjá teimum – sum eitt vanligt fríggjakvøld.

– Her var nógv fólk, góður hýrur, ongin ballada og onki brotið, sigur hann við Sosialin.

# ligir hooligans og fullir føroyingar

á Tórsvølli í gjár. Teir fóru av landinum aftur tíðliga í morgun.

Aftur um tvær vikur spæla føroyingar dyst, ið verður flokkaður sum serliga vandamikil. Hetta verður returdysturin millum Brøndby og B36, sum verður spældur í Havn. Eisini tá verða danskir politistar boðsendir til Føroya at hjálpa føroysku politistunum. Men, verður sagt av politistøðini í Havn, um tvær vikur verða tað politistar úr Keypmannahavn, sum koma upp, tí teir kenna betri muruna hjá viðhaldsfólkunum hjá Brøndby enn politistarnir úr Jútlandi.




*Bæði hýrurin og veðrið vóru av tí allarbesta í gjár. Um alla Havnina var eitt yðjandi lív av væl nøgdum fótbóltsfjepparum, forvitnum føroyingum og vilstum víkingum*

# Nógv til børnini Tróndardagarnar

**Nógv verður gjørt burturúr Tróndadagarnar og sjálvandi verður eisini gjørt nógv burturúr undirhaldi til børnini**

TRÓNDARDAGAR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Leygardagurin verður ein rættur familjudagur á Sandinum í Gøtu. Har er nakað fyri øll: hoppiborg, ponyríðing, andlitsmáling og annað. Ein rúgva av undirhaldi verður klokkan 15.00, tí tá koma rættir víkingar rógvandi inn á Sandin, har teir fara at berjast, júst sum í gomlun víkingadøgum.

Trøllapætur og hansara harkalið koma og klokkan 17.00 kemur Jimmi at vísa sítt serliga show við t.d. eldi og jongløri.

Angela og Hannebal vitja eisini, og síðst, men ikki minst, fara vit at síggja sjónleikin "Tróndur í gøtu livir enn". Har verður nógv gjørt burtur úr.

- Vónandi fáa bæði stór og smá ein frálíkan dag, sigur Angela Petersen, fyrireikari.

**Skrá:**
Kl.14.00 pony ríðing
Kl.15.00 Víkingar koma
Kl.15.30 Andlitsmáling
Kl.16.00 Trøllapætur og co
Kl.17.00 Eldshow við Jimmi
Kl.18.00 Angela og Hannebal
Kl.19.00 Sjónleikurin "Tróndur í Gøtu livir enn"

